# 200 byrjaðu ólavsøku-konsertina

TÓNLEIKUR
*Sunneva H. Eysturstein*
*sunneva@sosialurin.fo*

Eg havi ringt við at siga nakað negativt um 200. Føli tað næstan sum um, at eg eri vaksin upp við teimum (uttan at fornerma teirra aldur!) Tí hvat er ein perfekt 200 konsert?

Teir eru góðir óansæð hvat – og serliga, tá teir eru nóg rótutir og rokkutir og sveittutir.

Tað var fínt at hoyra teir spæla fyrst til ein avveksling. Midnáttarsamkoman við teimum er eitt sindur vatnað akkurát nú, og tað var áhugavert at hoyra, at teir eisini rokka, sjálvt um klokkan bara er 19.00 og einans 50 fólk eru frammanfyri pallin (sum so bleiv til 100-150 aftaná eina løtu)

- Samfelagið er í vanda, greiddi Niels frá, tá teir einastaðni mitt í framførsluni komu til lutvíst nýggja lagið Tunnilsvisjón.

- Størsti vandin er ikki, at vit ikki fáa pengar úr Danmark og doyggja. Men størsti vandin er, at um vit ikki fáa undirsjóvartunnil til Sandoynna í morgin, verður sorg og deyði! Tað er viktugt og einki at flenna at; viktugt fyri pengarnar, sum vit ikki eiga, at vit gera tunlar!


©mureldur

Afturat hesum komu nakrar aðrar deiliga 200sligar situatiónir, so sum ein kvøða til farnu abc samgongu við 20 sekundum í tøgn; 30 sekund punkrokk við Fjern den klud; og ein tilogning til Gerhard Lognberg av "Frustreraðir javnaðarmenn, sum eisini eitur Frustreraðir javnaðarmenn/javnaðarmenn sum burdu verið í Miðflokkinum".

Vit hoyrdu eisini Mogghøvd og Graceland. Muscleman Blað kundu teir ikki spæla, tí at Dennis Agerblad longu hevur gjørt tað nógv betri við sínari "feitu, elektronisku bøssaversión." Endin varð Sig ikki nei, Kaj, og enn einaferð stóð man eftir við hasari frísku, ristu kensluni, sum man altíð fær av teirra framførslum. Perfekt.


©mureldur

# Katla og tónleikahøvdingarnir

TÓNLEIKUR
*Sunneva H. Eysturstein*
*sunneva@sosialurin.fo*

Dávur Magnussen, Magnus Johannesen, Ólavur Olsen, Rógvi á Rógvu og Edvard Nyholm Debes manna bólkin Katla, sum var liðugur at framføra í Tjóðpallinum stutt fyri midnátt fríggjakvøldið.

Væl av fólki varð savnað inni í Tjóðpallinum, tá Katla komu gangandi og spælandi inn á pallin. Hølið er fantastiskt og perfekt til hugnaligar konsertir sum hesa. Kanska enntá betri egnað enn onnur spælihølir her á leiðum. Men lat tað fara.

"Vinarligur jazzkendur fólkapoppur" er nokk tað tættasta, eg í skrivandi løtu kann koma uppá at lýsa tónleikin hjá Katla. Hetta er melodiskur, rútmiskur fólkatónleikur við ískoyti av gospel og tango og øðrum lekrum stílum, og er tað, sum ein tímir ordiliga væl, tá ið oyragongin hevur tørv á at mýkjast. Og so er tað altíð ein fragd at hoyra hesar tónleikahøvdingarnar framføra, tí ein veit, at teir spæla væl og klára altíð at levera vøruna. Tað er móttakiligur tónleikur, og so kann spurningur, um mær dámar stílin, vera líkamikin.

Klapp til Katla fyri eina deiliga framførslu við einari rúgvu av flottum tónlistarligum dygdum.

# Gamalt og nýtt frá Stanley

**Stanley Samuelsen gav áskoðarunum eina fjølbroytta framførslu, tá hann fór á pall við gomlum tekstum og nýggjum løgum, tá FUTT í býin var fríggjakvøldið**

TÓNLEIKUR
*Bjørk K. Olsen*
*bjork@sosialurin.fo*

Kanska heldur eldri ættarliðið fór leiðina niðan til Tjóðpallin, har Stanley Samuelsen fór á pall til FUTT í býin fríggjakvøldið, hóast yngra ættarliðið hevði kunnað hugnað sær ófórt.

Stanley Samuelsen framførdi egin løg og tekstir, millum annað Rasmus Effersø hevur yrkt.

Tyssir av veikum, gulum og hvítum ljósstrálum gjørdi umhvørvið spennandi, og tað kendist, sum fórt tú inn í eina mystiska verð – júst sum blandaða framførslan av gomlum og nýggjum hjá Stanley Samuelsen.

Millum annað hevur tónleikarin gjørt eitt nýtt og øðrvísi lag til tekstin »Tíðin rennur sum streymur í á«. Eg fekk einaheilt aðra uppfatan av tekstinum, tá Stanley kryddaði framførsluna við rokkutum millumspølum á gittarinum.

Sum heild eitt frálíkt upplivilsi. Ikki nakað yvir-gott, men tú fekst eitt jaligt upplivilsi av tekstum, iðikki júst eru skrivaðir til dagsins tónleik. Hóast eg longdist illa eftir einum dansigólvi, eg kundi taka mær ein sving-om á til hugnaliga tónleikin, gav Stanley Samuelsen mær eina áhugaverda løtu á Futt konsertinum fríggjakvøldið.


©mureldur


*Páll Finnur Páll riggaðu væl í øðrvísi umhvørvinum*
*Mynd: Edith Johannesen*

# Páll Finnur Páll rigga eisini í smáum

**Við hugnaligu kosertini í lítla umhvørvinum í Reinsarínum, vístu Páll Finnur Páll, at teir eisini stórtrívast uttanfyri stóra pallin**

TÓNLEIKUR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Páll Finnur Páll høvdu eina sera hugnaliga konsert á Reinsarínum ólavsøkuaftan.

Tað var ein lítil áhoyrarafjøld, ið lurtaði eftir Páll Finnur Páll í Reinsarínum, men hóast áhoyrarafjøldin ikki taldi meira enn knapt 45, varð talan um eina sera hugnaliga konsert.

Við løgum av øllunum trimum fløgunum hjá teimum, undirhildu teir teirri lítlu, men lívligu áhoyrarafjøldini við framúr góðum tónleiki. Øll hittini, umframt fleiri av teimum annars sera góðu løgunum, vórðu framførd, og fólkini tóku tónarnar til sín við einum brosi.

Teir vístu, at teir rigga eins væl í einum lítlum og hugnaligum spælistaðið, sum Reinsaríið er, og á einum stóru palli. Tað var ein sera góð og intens konsert, har samskiftið millum tónleikarar og áhoyrarar var sera gott.